# Arbeiðsloysið minkaði í februar

**Arbeiðsloysið fyri februar 2006 er gjørt upp til 3,4% av arbeiðsfjøldini. Hetta er ein minking upp á 0,2 prosentstig síðani januar, tá arbeiðsloysið var 3,6%**

HAGTØL
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Arbeiðsloysið fyri februar 2006 er gjørt upp til 3,4 prosent av arbeiðsfjøldini. Hetta er ein minking upp á 0,2 prosentstig síðani januar, tá arbeiðsloysið var 3,6 prosent

Hetta er fyrstu ferð síðani 2002, at tað vóru færri fulltíðararbeiðsleys í februar enn í januar. Síðani arbeiðloysið aftur fór at vaksa á heysti 2002 hevur arbeiðsloysið í februar annars vanliga verið um 0,2 prosentstig hægri enn í januar. Tað er tí líkt til, at hetta boðar frá góðum og er ein ábending um eina veruliga vend í gongdini. Á sama borð ber tað, at tey árstíðarjavnaðu tølini fyri fulltíðarebeiðsloysi nú eru minkað 5 mánaðir upp í røkur.

### Størsta minkingin í Suðuroy

Minkingin í arbeiðsloysinum sást aftur í øllum sýslunum uttan í Vágum, har talið av fulltíðararbeiðsleysum fór úr 49 upp í 58. Tann størsta minkingin var Suðuroy, har fulltíðararbeiðsloysið minkaði við 35 fólkum niður í 160 í februar.

Arbeiðsloysið í reinum tølum er nógv størst í Streymoyar sýslu, ið hevur 43% av øllum teimum arbeiðsleysu. Hinvegin búgva her 46% av fólkinum í aldrinum 16-66 ár, so arbeiðsloysið er lutfalsliga minni í Streymoyar sýslu enn í øllum landinum.

Rokna vit talið av fulltíðararbeiðsleysum fyri hvørjar 1.000 íbúgvar í aldrinum 16-66 ár, fáa vit eitt mát fyri, hvussu stórt arbeiðsloysið er lutfalsliga. Hetta er gjørt fyri hvørja sýslu í myndini niðanfyri, har tølini eru roknað sum miðal av undanfarnu 3 mánaðunum fyri at fáa eina róligari mynd.

### Minst í Eysturoy

Myndin vísir, at arbeiðsloysið seinastu 4 árini hevur verið lutfalsliga minst í Eysturoynni og (nógv) størst í Suðuoy. Men arbeiðsloysið í Suðuroy er eisini heilt nógv minkað. Tá tað fyri einum ári síðani var mest (nítiárini undantikin), taldu tey fulltíðararbeiðsleysu í Suðuroynni 88 av hvørjum 1.000, meðan talið nú er komið niður á 50.

Annars líkist serliga gongdin fyri Norðoya sýslu burturúr. Norðoya sýsla hevði í mai 2002 tað lutfalsliga minsta arbeiðsloysið í landinum har 14 av hvørjum 1.000 vóru arbeiðsleys. Hetta talið er síðani tá so líðandi vaksið, og var í februar 2006 komið upp á 37, ið er tað næsthægsta í landinum.

*Kelda: www.hagstova.fo*




*Hagstovan sigur, at arbeiðsloysið minkaði í februar*

## BRÚKARATORGIÐ

# Klókari næmingar av frískari inniluft

**Avrikini hjá skúlanæmingum batnaðu við nærum 30 prosentum, tá inniluftin í flokshølinum varð betrað, vísir nýggj kanning frá danska granskingarstovninum DTU**

INNLÆRING
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*



*Avrikini hjá skúlanæmingum sigast at betrast við upp móti 30 prosentum, tá inniluftin er betri*

Um inniluftin ella inniklimaðið í skúlunum var eins gott og tað er á skrivstovum hjá vaksnum, so høvdu avrikini hjá næmingunum verið upp í 30 prosent betri enn í dag. Tað vísir ein nýggj kanning, sum granskarar frá Danmarks Tekniske Universitet hava staðið fyri.

Kanningin var soleiðis skipað, at granskararnir fóru inn í ein vanligan danskan fólkaskúla, sum lúka núverandi donsku lógarkrøvini til undirvísingarumhvørvið. Í eina viku í senn hava granskararnir eygleitt og kannað tvey 4.-6. flokkstig.

Næmingarnir vistu ikki av, at granskararnir tvífaldaðu ventilatiónina og lækkaðu hitan í flokshølinum, so tey svaraðu til krøvini, ið sett verða til innandura arbeiðsumhvørvið hjá vaksnum.

– Næmingarnir fingu seks til átta uppgávur, í eitt nú støddfrøði, málsligum førleika, fyrisøgn og førleikanum at loysa trupulleikar. Og úrslitið var ikki sørt skelkandi. Tá luftin var betrað, kláraðu næmingarnir í miðal 15 prosent fleiri uppgávur uttan at gera villur. Og nakrir næmingar megnaðu at loysa upp í 30 prosent fleiri uppgávur, uttan at gera villur, sigur Geo Clausen, professari frá Danmarks Tekniske Universitet við B.T.

# Fartelefoni økir nógv um vandan fyri krabbamein

**Um tú tosar í fartelefon ella tráðleysari telefon í ein tíma um dagin, tvífaldast vandan fyri at fáa krabbamein í heilanum**

FARTELEFONI
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Ein nýggj svensk kanning vísir, at vandin fyri at fáa krabbamein í heilanum økist við 100 prosentum hjá teimum, sum tosa í fartelefon ella tráðleysari telefon í ein tíma hvønn dag.

– Hetta er fyrsta kanningin í heiminum, sum fevnir um ein bólk av sjúklingum, sum hevur nýtt fartelefon gjøgnum nógv ár, sigur Lennart Hardell, professari við Örebro Universitetssjúkrahús, og ein av granskarunum aftanfyri kanningini, við Ritzau.

Kanningin stendur í andsøgn við einari eldri danskari kanning, sum vísti, at vandin fyri krabbameini ikki var størri hjá teimum, sum tosa í fartelefon.

– Tá eg komi fram til eitt annað úrslit, er tað grundað á, at eg havi kannað sjúklingar, sum gjøgnum nógv fleiri ár hava tosað í fartelefon. So her síggja við langtíðarárinini, sigur Lennart Hardell.

Svenska kanningin varð gjørd í árunum 1997 til 2003 og fevnir um 905 sjúklingar, sum hava krabbamein í heilanum. Kanningin vísir eisini, at vandin fyri krabbameini er størstur á tí síðuni av høvdinum, sum verður brúkt til fartelefoni.



*Strálurnar frá tráðleysum og fartelefonum sigast vera sera vandamiklar*